# Heri Hjelm noyðist at siga 120 fólkum úr starvi

**– Tað er sannlíkt, at alt virksemið í Vági og í Porkeri verður lagt stilt fram til mánaðarskiftið, juni/juli. Tað merkir, at vit í fyrsta lagi noyðast at siga 120 fólkum úr starvi, harav onkrum leiðarum, sigur Heri Hjelm, sum harmast um, at aðrir møguleikar ikki skulu vera**

ALIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Um stutta tíð noyðast 120 fólk í Vági og Porkeri til hús, tí Heri Hjelm hevur ongan tøkuføran fisk eftir.*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

Alt bendir á, at um ein mánaða ella so heldur alt virksemið hjá Hera Hjelm á Suðurlaks í Vági og á Roykivirkinum í Porkeri uppat í eitt hálvt. Tá eigur felagið ongan fisk eftir at arbeiða á virkjunum, og líkt er ikki til, at tað fer at loysa seg at keypa laks ella síl frá øðrum, soleiðis at arbeiði kann verða samanhangandi fram til komandi summar, tá ið fiskur aftur er búgvin til tøku.

Á Suðurlaks í Vági, sum er fyrrverandi Polarfrost, verður fiskurin tikin og skorin ella fileteraður, sum tað verður rópt undir einum. Har hevur hann eisini verið góðskaður og pakkaður. Roykingin fer fram á virkinum í Porkeri.

Heri Hjelm hevur umleið 120 fólk í arbeiði á báðum virkjunum.

Umframt tey, sum starvast innanveggja í Vági og Porkeri, hevur hann 20-30 fólk í arbeiði við fóðring, framleiðslu av útgerð og umvæling og á smoltstøðini.

### Stórur missur

Ein illveðursdag í vár misti Heri umleið helmingin av árganginum, sum var tøkuførur, tá ið aliringar hjá honum slitu og róku á land.

Hetta var ein stórur missur og dyggur smeitur – ikki bara fyri virksemið hjá aldaranum, men eisini fyri tey mongu, sum vinna sítt livibreyð í Vági og í Porkeri.

Heri Hjelm harmast um, at eingin gongd leið vísir seg at vera sum kann byrgja uppfyri, at fólk nú noyðast til hús um ein mánaða ella so.

– Tað er sannlíkt, at alt virksemið í Vági og í Porkeri verður lagt stilt fram til juni ella juli, og hetta merkir eisini, at neyðugt verður at siga onkrar leiðarar úr starvi.

Hann vísir á, at tað er ógvuliga keðiligt at noyðast at siga fólkinum upp, tí tú veitst ikki, um tey verða tøk, tá ið brúk verður fyri teimum aftur um mánaðarskiftið, juni/juli komandi ár.

### Skotskur fiskur

Sum skilst, hevur Heri kannað ymiskar møguleikar at keypa fisk til virkingar í Vági og í Porkeri, eitt nú hevur verið uppá tal at keypa ísaðan alifisk úr Skotlandi, men tað vísir seg, at fiskurin er ov dýrur. Hinvegin hevði hetta latið seg gjørt, tí Heri hevði ikki fingið trupulleikar við tolli, um fiskurin kom úr Skotlandi.

- Tað vísir seg heldur ikki at vera nøkur gongd leið at keypa fisk aðrastaðni úr Føroyum, sigur hann.

Sum enn ein møguleika, hevur Heri tosað við Føroya Fiskavirking, sum eigur virkið í Vági, um at sleppa at arbeiða vanligan ísfisk, meðan bíðað verður eftir laksinum, men hesin tankin hóvar ikki Fiskavirking.

Tað er torført at spáa um framtíðina, vísir Heri Hjelm á, men hann væntar, at tá ið fiskur aftur verður tøkuførur um mánaðarskiftið, juni/juli komandi ár, verður aftur støðugt arbeiði, bæði í Vági og í Porkeri.

# Greiða fingin á ósemjuni millum Føroyar og Grønland um kongafiskin í Irmingarhavinuma

**Í døgunum, 18.19. november, vóru árligu fiskivinnusamráðingarnar millum Føroyar og Grønland hildnar í Keypmannahavn.**

**Jørgen Niclasen, landsstýrismaður, er nøgdur við avtaluna, sum loysir uppí stríðnum, sum var millum Føroyar og Grønland fyrr í heyst**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Jørgen Niclasen, landsstýrismaður, er nøgdur við avtaluna við Grønland – ikki minst, tí hon greiðir spurningin um kongafiskakvotuna, sum stríð stóðst av millum føroyskar og grønlendskar myndugleikar í heyst.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Á fundinum varð avtalan fyri árið, sum skjótt er umliðið, endurskoðað, og hetta er eitt av málunum, sum Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri, hevði sett sær fyri.

Partarnir komu ásamt um, at føroysk skip í komandi ári kunnu fiska 4.000 tons av uppsjóvar kongafiski av felags Føroyar/Grønland/ NEAFC-kvotuni í Irmingarhavinum ella í grønlendskum sjógvi. Í avtaluni er møguleikin innbygdur, at hendan kvotan kann økjast við 1200 tonsum aftrat eftir ávísum leisti, sum semja nú er um.

Grønlendsk skip kunnu fiska 2.800 tons av norðhavssild burturav føroysku strandarlandskvotuni í føroyskum sjógvi ella í altjóða øki, men Grønland fær ikki makrel í føroyskum sjógvi komandi ár.

Partarnir samdust um at halda fram at royndarveiða hjá hvørjum øðrum, soleiðis at føroysk skip kunnu fiska við troli ella línu 150 tons av svartkalva í Vesturgrønlandi, norðanfyri 68 stig N. Aftrat hesum kunnu í mesta lagi 3 skip í senn fiska við troli ella línu eftir toski, brosmu og steinbíti í Eysturgrønlandi í upp til 100 fiskidagar tilsamans. Hjáveiðan av kalva og svartkalva er sett til 250 tons tilsamans.

Hinvegin kann ein grønlendskur trolari fiska upp til 450 tons av botnfiski í føroyskum sjógvi. Hjáveiðan av toski og hýsu kann í mesta lagi verða 20% av botnfiskaveiðuni. Eitt grønlendskt skip kann eisini royndarveiða eftir krabba á ytru fiskidagaleiðini.

Partarnir komu ásamt um, at tað aftur í 2003 skal vera møguligt at býta fiskidagar eftir rækjum á NAFO- økinum, og hevur Grønland lodnu eftir í Eysturgrønlandi, skal vera møguligt hjá føroyskum skipum at keypa burturav hesi. Eisini kunnu føroysk skip fiska 50% av íslendsku lodnukvotuni í grønlendskum sjógvi.

Eins og undanfarna ár, skal aftur komandi ár verða møguligt hjá føroyskum verksmiðjuskipum at taka ímóti fiski í Grønlandi, um toskafiskiskapurin skuldi byrjað aftur, og grønlendsk virkir ikki fáa tikið ímóti.

Partarnir eru samdir um at virka fyri vaksandi fiskivinnusamstarvi í vinnuni hjá báðum londunum. Hetta hevur við sær, at føroysk og grønlendsk reiðaríir framvegis kunnu gera avtalur um yvirskotskvotur í grønlendskum sjógvi.

Partarnir umrøddu samstarvið um fylgisveinaeftirlit og um veiðitøl. Eisini umrøddu partarnir samstarvið í NAFO, NEAFC og NAMMCO umframt umsitingina av kongafiskastovninum í Irmingarhavinum.

Landsstýrismaðurin, Jørgen Niclasen, er nøgdur við avtaluna – ikki minst, tí hon greiðir spurningin um kongafiskakvotuna, sum stríð stóðst av millum føroyskar og grønlendskar myndugleikar í heyst.



# Landið hevur longu goldið ein undirsjóvartunnil



*Tað er støðugt vorðið dýrari at gera undirsjóvartunnil undir Vestmannasundi. Upprunaligi kostnaðurin varð mettur til 230 mió. íroknað Mvg.*

**Kostnaðurin fyri undirsjóvartunnilin um Vestmannasund er vorðin 155 milliónir dýrari, enn tað upprunaliga varð ætlað**

VÁGATUNNILIN
*Heri á Rógvi*

10. desember letur undirsjóvartunnilin undir Vestmannasundi – Vágatunnilin – upp fyri ferðslu. Kostnaðurin fyri tunnilin ger hann til størstu verkætlanina av sínum slag hjá landinum nakrantíð.

Í mun til upprunaliga ætlaða upphæddini, er væl meira brúkt

Niels Winther, fulltrúi á Vinnumálaráðnum, upplýsir, at samlaða peninganýtslan til Vágatunnilin verður nú mett til einastaðni millum 275 og 280 milliónir kr. Orsøkin til ókonkreta talið er, at Vágatunnilin skal fremja nakrar gjaldingar íroknað byggirenta, ið goldnar verða beinanvegin, men sum fella til gjaldingar seinni, og virðið verður sostatt ógreitt.

Kostnaðurin av Vágatunnilinum varð upprunaliga mettur til 240, tá gongd varð sett aftur á verkætlanina. Niels Winther upplýsir, at 203 mió. verða nýttar til tunnilsgerð, 31 til vegagerð v.m. og 21 milliónir til annað arbeiði íroknað prosjekt í sambandi við tunnilin. Hetta gevur 255 mió í alt til sjálvt annlegsarbeiðið Vinnumálaráðið hevur fingið upplýst, at samlaða peninganýtslan verður sum nevnt 275-280 mió.

Av hesum pengum eru 160, 3 mió. játtaðar á fíggjarlógini. Restin, umleið 120 mió., verður lánfíggjað til P/F Vágatunnilin við einari vanligari kommersiellari rentu.

Eitt annað tal, ið eisini inngongur í roknistykki, er upphæddin, ið P/F Vágatunnilin hevur fingið afturgoldið fyri Mvg. Sum partafelag fær Vágatunnilin Mvg afturgoldið, og hendan upphæddin svarar til umleið 60 mió. kr., upplýsir Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri. Hesin pengingur fellur aftur til partafelagið, sum er Mvg skrásett, og hevur tí rætt til hesar pengar. Nú verður tosað um, at Vágatunnilin skal frítakast fyri Mvg fyri at gera ferðingina bíligari.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum sigur seg ivast í, um P/F Vágatunnilin hevði kunnað fingið Mvg afturgoldið, um so var, at tað varð greitt frá byrjan, at ferðakostnaðurin skuldi frítakast fyri Mvg.

### Upprunaliga 230 mió.

Leita vit aftur til 1988, so varð tað eisini planlagdur ein Vágatunnil tá. Hesin sami tunnilin undir Vestmannasund var eitt politiskt ynski, og tí varð farið undir at fyrireika.

Saman við einari norskari ráðgevingarfyritøka gjørdi Landsverkfrøðingurin tá eitt prosjekt, sum skuldi meta um kostnaðin upp á ein undirsjóvartunnil.

Tá varð arbeiðið mett til at kosta 230 mió. íroknað toll/Mvg. Viðmerkjast skal, at tá var eisini alt vegarbeiðið íroknað.

Játtaðar vórðu frá 1987 til 1989 45 mió til verkætlanina.

Táverandi stjórin fyri Landsverkfrøðingin, Henning Jacobsen, upplýsir, at hesir pengar fóru til at fyrireika arbeiði, at gera arbeiðs brúgv, keypa maskinur og amboð, keypa arbeiðsskúrar og annað.

Leggja vit øll tølini saman, íroknað afturgoldið Mvg., so hevur landið higartil goldið 265 milliónir til verkætlanina, og hetta gevur væl meira enn ein undirsjóvartunnil skuldi kosta. Afturat hesum kemur so lántøkan hjá P/F Vágatunnilin áljóðandi umleið 120 milliónir kr.

### Leisturin munurin

Henning Jacobsen sigur, at tað eru fleiri ting, sum hann roknar við gera, at tunnilin so nógv dýrari, enn tað upprunaliga varð ætlað.

–Arbeiðsleisturin í hesari verkætlani er øðrvísi enn tann, sum vit ætlaðu, og saman við tíðarspurninginum er hetta nokk tann størsta orsøkin til dýrkanina, sigur Henning Jacobsen.

Í tí upprunaligu ætlanini skuldi arbeiðið taka eini 4 ár. Alt skuldi fíggjast umvegis landskassan. Tað var ikki fyrr enn seinni, at tosað varð um bummpengar og partafelag at fíggja tunnilin.

Tær 230, sum tað upprunaliga varð ætlað, at tunnilin skuldi kosta, vórðu við toll/Mvg, og Hennin Jacobsen minnist, at teir høvdu fingið loyvið til at fáa Mvg. afturgoldið.

## Fakta

- Vágatunnilin
- Kostnaðurin mettur til: 240 milliónir kr.
- Samlaða nýtslan til bygging íroknað veg: 275-280 mió. kr.
- Játtaðar á fíggjarlóg: 160,3 mió. + 45 mió. í 87-89
- Lántøka: Umleið 120 mió.
- Afturgoldið Mvg: Umleið 60 mió.

## Charlotta á tingi



*Charlotta á Váli Olsen hevur seinastu tíggju dagarnar sitið á tingi sum varamaður fyri Jenis av Rana*

Seinastu tíggju dagarnar hevur Charlotta á Váli Olsen tikið sæti á tingi fyri Jenis av Rana. Hon tók sæti fyri Jenis hin 12. november. Jenis av Rana endaði sítt farloyvi í gjár – hósdagin.

Í blaðnum í gjár frætti vit um ein fyrispurning hjá henni viðvíkjandi neurologtænastuni. Tingið samtykti uttan atkvøðugreiðslu, at fyrispurningurin skal svarast.

Á øðrum plássi hjá Miðflokkinum í Suðurstreymoy stóð á jøvnum. Tey bæði, Charlotta á Váli Olsen og Jónfinn Olsen, fingu bæði 47 atkvøður. Tískil skuldi lutakast til fyri at gera av, hvør av teimum skal gerast varamaður hjá Jenisi.

Valstýrið tók lut, og valið fall so á Charlottu, sum fyri fyrstu ferð á hesum sinni hevur tikið sæti á Føroya Løgtingi.

Viðmerkjast skal, at tað eydnaðist okkum hvørki at fáa fatur á Jenis av Rana ella Charlottu á Váli Olsen til eina viðmerking.

Charlotta á Váli Olsen er 47 ára gamul og ættað úr Klaksvík. Hon er útbúgvin pedagogur og starvast til dagligt sum leiðari á frítíðarskúlanum á Argjum.